# – Vit kunnu læra av Svøríki

**– Tað er ein stórur fyrimunur fyri ein bý sum Klaksvík, at fólkið stendur saman um skipini og fyritøkurnar í lokalsamfelagnum, segði Steinbjørn O. Jacobsen millum annað, tá ið hann helt røðu fyri svenska forsætisráðharranum. Hann helt eisini, at Føroya kunnu læra nógv av Svøríki**

PERSSON
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fríggjakvøldið vitjaði svenski forsætisráðharrin í Klaksvík, og har vóru løgmaður og Klaksvíkar býráð vertir fyri ein døgurða í Skálanum.

Umframt almennu umboðini úr Føroyum og Svøríki, vóru eisini innboðin fólk við til døgurðan.



*Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, heldur røðu fyri svenska forsætisráðharranum undir døgurðanum í Skálanum*

Borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen, greiddi í sínari røðu stutt frá søguni um Klaksvík, og hann legði dent á týdningin, sum fiskivinnan og lokali samleikin hava fyri býin.

– Ein tjóð, sum í so stóran mun er grundað á fiskivinnuna, kennir til sving-andi konjukturar. Undir slíkum umstøðum er tað ein stórur fyrimunur fyri ein bý sum Klaksvík, at fólkið stendur saman um skipini og fyritøkurnar í lokalsamfelagnum, segði Steinbjørn O. Jacobsen.

### Kunnu læra av Svøríki

– Eitt gott dømi um hetta er stóra kreppan, sum rakti Føroyar fyrst í 1990'unum. Tá kom Klaksvík skjótt burtur úr kreppuni, tí lokalar kreftir tóku seg saman og keyptu skipini og fyritøkurnar, sum vóru farnar av knóranum.

Steinbjørn O. Jacobsen fegnaðist um vitjanina hjá Gøran Persson og segði seg vóna, at ein slík vitjan vildi skapa nýggj sambond millum Føroyar og Svøríki.

– Vit hava nógv at læra av Svøríki. Tit hava sum største land í Norðurlondum gingið undan í nógvum førum og víst vegin fyri nýggjum menningarmøguleikum. Vit vóna, at tit eisini kunnu fáa okkurt burtur úr sambandinum við Føroyar, segði borgarstjórin í Klaksvík.

# Persson fekk ein smakk av føroyskum fiski



*Svensku forsetahjúnini vóru sera áhugað í føroysku fiskavørunum. Johanna Vang, sølukvinna á Kósini, greiddi teimum og løgmanni frá um vørurnar*

*Myndir: Bárður Lydersen*



*Gøran Persson setti eisini spurningar um ymiskt á framsýningini á Kósini*

**Nógv varð gjørt burtur úr framsýningini av føroyskum fiskavørum, tá ið Gøran Persson vitjaði á Kósini í Klaksvík**

FISKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fríggjakvøldið vitjaði Gøran Persson á Kósini í Klaksvík, og har varð hann vístur runt á einari flottari framsýning av føroyskum fiskavørum.

JFK, Kósin, Norfra og Tavan vístu sínar vørur fram, og har vóru allar hugsandi fiskavørur sýndar fram – alt frá saltfiski, flaki og heilum toski til rogn og gullaks.

Svenski forsætisráðharrin var sera áhugaður í framsýningini, og eftir at hann hevði sæð allar vørurnar í livandi líki, fekk hann eisini eina framløgu um føroysku fiskavørurnar.

Vitjanin á Kósini vísti, at føroyingar duga væl at fáa burtur úr fiski og at gera vørurnar innbjóðandi og fjølbroyttar.